## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Lekjandi hendur – am. filmur - Dean Kraft hevur lekjandi gávur, men tað eru ikki øll, sum trúgva tí., **10.** ***(22.05)***
- Misery – am. Stephen King ræðufilmur  Óhóskandi fyri børn  - Ein rithøvundur kemur sær í ta støðu, at hann noyðist at skriva fyri lívinum., **10.** ***(23.30)***
- Revenge of the Pink Panther - , **11.** ***(20.35)***
- Turistur av tilvild - amerikanskur filmur - (The Accidental Tourist), **14.** ***(21.10)***

**3+**
- Au Pair II, **11.** ***(17:45)***
- Come On Get Happy, **16.** ***(10:35)***
- Conquering fantasies, **11.** ***(23:40)***
- Crazy in Alabama, **14.** ***(19:00)***

**BBC Prime**
- Fields Of Gold, **10.** ***(20:00)***

**Canal+**
- Asterix og Obelix - Missión Kleopatra, **10.** ***(19:00)***
- Blade 2, **11.** ***(19:00)***
- Lukkuligi Jim, **14.** ***(19:00)*** **16.** ***(14:15)***
- Mín lorta skýggi, **10.** ***(22:40)***
- Morð hjá grannanum?, **16.** ***(19:00)***
- Rocky IV, **13.** ***(20:00)*** **14.** ***(11:35)*** **16.** ***(3:40)***
- Sex á skránni, **15.** ***(19:00)*** **16.** ***(8:45)***

**Canal+Gul**
- Blade 2, **15.** ***(20:00)***
- Bróðurringurin, **10.** ***(2:00)***
- Eitt vakurt sinni, **10.** ***(23:20)***
- Pootie Tang, **10.** ***(22:00)***
- Rocky IV, **15.** ***(7:40)***
- Ørur mikudagur, **10.** ***(6:00)***

**DR 1**
- Columbo: Drepandi avdúkingar, **11.** ***(20:30)***
- Contact, **10.** ***(20:45)***
- Harlequin: Íklædd til æventýr, **13.** ***(21:00)***
- Hjálp, eg eri kvinna, **10.** ***(23:10)***
- Krummerne, **11.** ***(19:05)***

**DR 2**
- Billy Bathgate, **12.** ***(19:40)***
- Ein hásummarsdreymur, **16.** ***(19:35)***
- Kjøtið skelvir, **16.** ***(22:00)***
- Og so er tað veitsla aftaná, **13.** ***(19:20)***
- Panserdiligensan, **12.** ***(17:26)***

**Hallmark**
- Audrey's Rain, **12.** ***(10:45)***
- Dreamkeeper, **11.** ***(15:30)*** **12.** ***(15:30)***
- Shadow Of A Doubt, **12.** ***(19:30)***

**TCM**
- Ein løgin eftirmiddagur, **12.** ***(20:00)***
- Midnáttarkossurin, **12.** ***(16:40)***

**TV 2 zulu**
- Girls Just Want to Have Fun, **16.** ***(11:05)***
- Jason Goes to Hell: The Final Friday, **10.** ***(22:25)***
- Marie Tempete, **10.** ***(11:05)***

**TV 3**
- Intimate Nights, **10.** ***(23:50)***
- Ørur í kærleika, **12.** ***(20:00)***

**TV-1000**
- High Heels and Low Lifes, **10.** ***(19:00)***
- I'm With Lucy, **16.** ***(19:00)***
- Prop og Berta, **11.** ***(15:00)***
- Quicksand, **10.** ***(3:40)***
- The Good Girl, **12.** ***(19:00)*** **15.** ***(21:00)***
- We Were Soldiers, **11.** ***(19:00)***

**TVDanmark1**
- 7. maktin, **11.** ***(2:15)***
- Brent gummi, **12.** ***(3:20)***
- Einaferð í Amerika, **12.** ***(21:00)***
- Gremlins, **10.** ***(20:00)***
- Plump Fiction, **14.** ***(20:00)***
- With Honors, **12.** ***(19:00)***

**TVDanmark2**
- Gia, **11.** ***(20:05)***

**Fríggjadag 10. kl. 18.30**



### Will og Grace
Will og Jack ganga við til at vera við í sjónvarpssendingini "Today". Ætlanini hjá teimum er, at teir skulu mótmæla at NBC rásin hevur valt at klippa ein koss millum tveir samkyndar í einum sitcom-parti.

**Fríggjadag 10. kl. 19.30**



### Ja, harra ráðharri!
Bretska fregnartænastan, M15, missir ein bombu á gólvið - skriv vísa at ein, fyri stutt síðan deyður, stjóri á M15 njósnaðist fyri Russland. Og verri enn tað er; hann varð kannaður og bleiv mettur at vera góðtikin av Civil Service Committee of Enquiry, á odda fyri hesari kanningini var sjálvur Sir Humphrey Appleby(Nigel Hawthorne).

**Fríggjadag 10. kl. 20.45**



### Snake Eyes
Í einum kasino í Atlantic City er ein týðandi nevaleiksdystur. Stemningurin inni og uttanfyri ringin er spentur - áskoðarnir rópa og heppa. Men undir dystinum verður ein áskoðari skotin og dripin. Løgreglumaðurin Rick Santero(Nicolas Cage) hyggur eftir dystinum saman við einum vini, ið er lívverji hjá einum ráðharra.

**Fríggjadag 10. kl.**



### High Heels and Low Lifes
Shannon er sjúkrasystir og hennara drongur Ray eru ikki sørt av einum drumbi. Tá hann gloymir hennara føðingardag fer hon í staðin í býin við síni bestu vinkonu Frances. Frances er amerikonsk sjónleikarinna, ið tað ikki gongur nakað serliga væl hjá. Á veg heim úr býnum hoyra tær nakað tær ikki skuldu hoyrt.

**leygardag 11. kl. 20.00**



### Au Pair
Jenny er arbeiðsleys eftir loknan lestur. Hon droymir um at fá ráð til at gifta seg við sínum drongi Charlie. Tá Jenny næstan hevur mist allar vónir um at fáa arbeiði, møtir hon Oliver Caldwell, ein upptikin familjufaðir, ið manglar eina barnagentu. Hann setir Jenny í starv og saman við aupair-familjuni fer Jenny til Frakland.

**Leygardag 11. kl. 20.05**



### Gia
Unga Gia hevur havt ein ræðuligan barndóm, har mamman fór frá familjuni, tá hon var 11 ár. Hon kemur ongantíð yvir tað og droymir í heilum um at sleppa burtur úr hennara barndómstaði, Philadelphia. Hon tekur fyrsta møguleikan sum býðst, og hon fer til New York. Gia er sera vøkur og beinanvegin fær hon starv sum model.

**Leygardag 11. kl. 21.00**



### Alistair McGowan hermir
Ein av heimsins mest gávaðu skemtarunum við stand-up og sketjum. Alistair McGowan er á odda í hesi skemtirøðini. Her hermir hann óvæntað eftir persónum, sum t.d. Woody Allen, Robbie Williams, Gary Lineker og "The Students Grants" - Hugh, Cary og Richard E - sum allir deila eina íbúð við Audrey Hepburn (Ronnie Ancona).

**Leygardag 11. kl. 21.20**



### Double Whammy
Ray Pluto er løgreglumaður í New York og hann er sálarliga tyngdur, eftir at konan og dóttirin doyðu í eini vanlukku fyri fleiri árum síðan. Lagið verður ikki betri tá hann og hansara starvsfelagi eta í eini matstovu, sum verður úti fyri einum vápnaðum ráni. Hann verður sjúkrameldaður og fer at ganga til kiropraktor við sínum ringa ryggi.

**Sunnudag 12. kl. 17.05**



### Í sjeynda himli
Mary er arbeiðsleys, eigur ongar pengar og er í ringum fylgjuskapi. Eric og Annie er ósamd um hvussu tey skulu fáa hana á rættkjøl aftur. Annie vil geva døtrini meiri tíð, meðan Eric vil gjarna grípa inn. Ímeðan royna Matt, Simon, Ruthie og Lucy at bjarga stórusystrini frá einum inkassofelagi. Men fer tað at ganga?...

**sunnudag 12. kl. 19.00**



### Hví mín sonur?
Matrósurin Allen Schindler er á einum venjingarskeiði í Japan. Ein dagin fylgja tveir menn honum inn á eitt vesi, har hann verður bankaður til deyðis. Heima í USA fær mamma Allen, Dorothy, tey sjokkerandi boðini. Men sorgin gerst til brennandi vreiði, tá hon gerst greið yvir at hennara sonur bleiv dripin av sínum egnu - tí hann var samkyndur.

**Sunnudag 12. kl. 19.00**



### The Good Girl
Justine(Jennifer Aniston) er ein kvinna, ið kennir seg avmarkaðan í síni tilveru. Maðurin hjá henni (John C. Riley) er málari og tá hann ikki málar roykir hann feitar saman við vininum Bubba. Í síni leitan eftir meining í lívinum kemur hon saman við Tom. Og hon byrjar eina afferu.

**Sunnudag 12. kl. 20.00**




### Reyðargullið 2 - Møguleikar og kvotur
Rækjuveiðan í Vesturgrønlandi vaks skjótt í sjeyti árunum. Russar, norðmenn, danir, spaniólar og aðrir, vildu eisini fáa part í reyðargullinum, sum føroyingar høvdu funnið. Í 1980 var kvotan í Vesturgrønlandi ikki nóg stór til eitt føroyskt rækjuskip.

**Mánadag 13. kl. 18.00**



### 2.Garasjan
Garasjan fær vitjan og vitjar runt í Føroyum. Garasjan hevur fingið vitjan úr Mikladali, Trøllanesi og hevur eisini verið og vitjað á Viðareiði. Her er prát við børn, teknifilmar, sangur, søgur og spæl á skránni.

**Mánadag 13. kl. 20.00**



### Rocky IV
Rocky møtir sínum vandamiklasta mótstandara nakrantíð, russaranum Ivan Drago(Dolph Lundgren). Rocky byggir sín kropp upp í russisku oyðimørkini. Dysturin - ein dystur um lív og deyða - verður meiri politiskur enn persónligur.

**Mánadag 13. kl. 20.45**



### Borðið fangar
Ray og Addy eru tveir elskarar úr arbeiðara-stættini, ið droyma um at skapa eitt betri lív saman, nú eftir at Ray er komin úr geglinum. Ray fær arbeiði gjøgnum ein gamlan kenning, men lønin er ring og dreymurin um eitt betri lív sær einki út. Til síðst, í eini desperatari roynd, gongur Ray við til at gera ein síðsta narkohandil við nakrar vinir.

**Mánadag 13. kl. 21.45**



### Innanfyri skotmála
Løgreglumaðurin, Tom Hardy, missir alt, meðan hann jagstrar ein ræðuligan raðsdrápsmann. Pápi Tom doyr í vónleysu jagstranin eftir drápsmanninum og Tom byrjar at drekka og fer í hundarnar. Tá tað sær ringast út, kemur ein kvinna inn í hansara lív - Jo Christman, hansara nýggi starvsfelagi. Men raðsdrápsmaðurin heldur á fram.





**Týsdag 14. kl. 19.00**



### Lovers & Leavers
Fullkomni kærleikin finst bara í bókum og á filmi. Tað vita øll. Men Iris, ið arbeiðir í einum bókhandli, trýr ikki hesum. Ímóti sannføringini hjá øllum vinum sínum, leitar hon eftir veruligum kærleika. Hetta er eitt finskt romantiskt drama.

**Týsdag 14. kl. 20.00**



### Absolutely Fabulous
Virðislønt undirhaldsrøð, sum gongur fyri seg í almenna mótaheiminum. Við spæla Jennifer Saunders, Joanna Lumley og June Whitfield. Patsy hevur fingið innspræningar fyri at frysta hennara rukkur, ímeðan skal Edina vera við á einum dag-chat-show.

**Týsdag 14. kl. 21.00**



### Dragnet
Eitt morð undir einum diamantráni setir detektiv-arnar á eitt sera fløkt og trupult mál. Lyklaorðið í hesum brotsmálinum eru ágirnd og vald. Hendan krimirøðin er grundað á klassisku Jack Webb røðina frá 1950´unum og 60´unum. Ed O´Neill, ið er kendur frá skemtirøðini Married with Children sum Al Bundy, er løgreglumaðurin Joe Friday.

**Týsdag 14. kl. 21.10**



### Turistur av tilvild
Macon er rithøvundur og hann skrivar ferðabøkur til fólk sum ikki ætla sær av fetanum. Macon sjálvum dámar eisini nógv best ein væl skipaðan gerandisdag har onki óvanligt hendir, og tað skal nógv til at taka hann av fótum. Tá konan vil skiljast, liggur tað illa fyri.

**Mikudag 15. kl. 18.30**



### Will og Grace
Will fær vitjan av eini high-school vinkonu, ið biðir hann vera hennara sáðdonorur. Grace heldur einki um hugskotið, men lukkutíð er Karen ein vinur í neyðini og kemur við eini loysn á hesum trupulleikanum.

**Mikudag 15. kl. 19.00**



### Spy Hard
Generalurin Rancor hótti við at spreingja Jørðina í stykkir. Tó hann manglar eitt mikrotjipp, ið er skapt av Ukinsky professaranum. Dick Steele verður settur á málið. Hann fær hjálp frá dóttir Ukrinsky, ið vísir seg at vera ein KGB-agentur. Hetta er ein skemtilig James Bond-parodi.

**Mikudag 15. kl. 20.00**



### Clocking Off
Macksa øvundsjúka yvir forholdið hjá Trudy og Martin fær Trudy at gevast á verksmiðjuni. Men so, brádliga, kemur svigarinnan og fyrrverandi elskarinna hjá Martin forbí, hon er 8 mánaðar inní barnferð.

**Mikudag 15. kl. 20.55**



### Undan væðingini: Krígsdøtur 1:3
Undir Seinna Heimsbardaga fingu nógvar konur sær bretskar hermenn til menn. Tær fóru av landinum og festu búgv í Bretlandi og mangur man hava spurt seg sjálvan, hvussu tað í grundini mundi gangast teimum. Tann spurningin setti SVF sær fyri at fáa svar upp á.

**Hósdag 16. kl. 18.00**



### Frasier
Nakað heilt óvanligt hendir fyri Frasier. Hann og Roz enda í song saman. Hetta ávirkar Frasier so mikið, at hann fer heilt til Wisconsin fyri at fáa tingini uppá pláss. Hetta var jú eisini eitt sera óprofessionellt trekk.

**Hósdag 16. kl. 19.00**



### Morð hjá grannanum
Lori og Tom flyta inn í dreymahúsið. Við síðuna av búgva teir fullkomnu grannarnir, Carl og Helen. Men undir friðsæluni, lúrir myrkrið. Ein dagin hvørvur Helen uttan nakað spor. Lori heldur, at Carl hevur myrt hana og byrjar at leita eftir sannleikanum.

**Hósdag 16. kl. 21.00**



### Kalifornia
Carrie Laughlin og drongur hennara Brian Kessler ætla at flyta til Kalifornia og byrja av nýggjum. Brian er høvundur, Carrie er fotografur. Brian hevur fingið eitt gott hugskot, ið kann gerast til eina bók: ein biltúr gjøgnum USA við støðgi í øllum teimum býunum, har illa kendir raðsdrápsmenn livdu og gjørdu sínar gerningar. Og so byrjar biltúrurin....

**Hósdag 16. kl. 21.00**



### Okkara kokkar
Okkara kokkar - 1. sending
Í hesi fyrstu sendingini í vetur fara kokkarnir at borðreiða við leskiligum, ovnbakaðum gratineraðum kalva við safrankremi. Eisini gera teir eina átuliga hvítvínssós afturvið kalvanum.

**Leygardagin kl. 20.00**



### Gospel 2003 – Finalan
Sent verður beinleiðis frá tiltakinum Gospel 2003, sum verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkar eru I Am úr Klaksvík, Direct Level av Strondum, Braquet og In Gethsemane úr Eysturoynni. Vit hoyra eisini stuttar samrøður við bólkarnar og ein gestabólk syngja. Vinnandi bólkurin fær eina ferð til ein festival uttanlanda.

**Hósdagin kl. 19.00**

### Tilvera
Til er ein lækni, sum er størri enn tú
Tomina Svøðstein gjørdist álvarsliga sjúk í 2002. Hon var í skundi send niður á Ríkissjúkrahúsið til kanningar. Tá var staðfest, at hon hevði krabbamein í livrini, og at sjúkan var farin víðari í likamið. Ongin viðgerð var, sum kundi geva henni heilsuna aftur.
Tá ein tíð var frálíðin, fór hon á møti við prædikumanninum Charles Endefon. Har var biðið fyri Tominu, og tá hon seinni var til kanning á sjúkrahúsinum, var krabbameinið horvið.


# VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin


## Ítróttur

**Leygardagin kl. 12.00**
Hondbóltur: Ol-gentur móti Mads Mikkelsen & Co.
**Sunnudagin kl. 5.30**
Formel 1: Japanska Grand-Prix av Suzuka

**Leygardagin kl. 0.00**
NHL: Philadelphia-Pittsburgh
Mikudagin kl. 3.30
NHL: Los Angeles-Ottawa

**Fríggjadagin kl. 2.00**
NHL: Colorado-Chicago
Mánadagin kl. 21.00
NHL: Buffalo-Dallas

**Sunnudagin kl. 13.30**
Hondbóltur: Kolding-Partizan Beograd, menn
Sunnudagin kl. 15.15
Hondbóltur: Ikast/Bording-Prodravka, kvinnur
Mikudagin kl. 19.00
UEFA Cup: FCK-Ferencvaros
Mikudagin kl. 20.55
Hondbóltur: Kolding-Viborg, kvinnur

**Sunnudagin kl. 14.40**
V5-Travet
**Mikudagin kl. 16.55**
UEFA-Cup: Esbjerg-Spartak Moskva

HM Beachvolley úr Rio de Janeiro, Brasilia
LG-Cup Snooker úr Preston, Onglandi
HM Roadracing úr Kuala Lumpur
U-23 HM Landavegssúkling úr Hamilton, Canada
ATP Tennis úr Lyon, Fraklandi
WTA Tennis úr Filderstadt, Týsklandi
WTA Tennis úr Zürich, Sveis
HM Fekting úr Havanna, Cuba
HM Kvinnufótbóltur úr USA
EM-undankapping í fótbólti
UEFA-Cup fótbóltur

**Fríggjadagin kl. 17.00**
U-23 HM Landavegssúkling úr Hamilton, Canada
**Leygardagin kl. 12.30**
NFL-Gameday
**Leygardagin kl. 14.00**
Junior HM Landavegssúkling úr Hamilton, Canada
**Sunnudagin kl. 11.55**
Íshockey: Odense-Herning
**Sunnudagin kl. 14.15**
HM Landavegssúkling úr Hamilton, Canada
**Sunnudagin kl. 20.50**
NFL: Denver Broncos-Pittsburgh Steelers
**Hósdagin kl. 21.45**
UEFA-Cup: Viktoria Zizkov-Brøndby

Formel 1 Japanska Grand Prix av Suzuka
EM-undankapping í fótbólti
Golf Dutch Open úr Hilversum, Hollandi
Borðtennis úr Baltoppen í Ballerup